# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Hanni Bjartalíð í Galerie Focus





*Fríggjadagin letur Hanni Bjartalíð upp eina framsýning í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fríggjadagin 28. mars kl. 16 til 18 letur ein framsýning við verkum hjá Hanna Bjartalíð upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Hanni Bjartalíð er úr Klaksvík, hann er útbúgvin á Nordiska Konstskolan í Kokkola í Finnlandi og er búsitandi í Finnlandi.

Myndamálið hjá Hanna Bjartalíð er lyriskt og einfalt. Í myndunum eru smáir figurar, hús og lutir. Á hesi framsýningini í Galerie Focus hevur hann nakað annaleiðis myndevni, við tað at hann málar avskeplaðar andlitsmyndir ella skortar við ymiskum úttrykkum og hartil hevur hann málað húsaskapilsir og fruktmyndir.

Framsýningin verður opin til 10. apríl, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Kurt Hansen**
Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum páskadag, 72 ára gamal.
Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum hósdagin 27. mars kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju fríggjadagin 28. mars kl. 13.

*Vegna tey avvarðandi*
**Kirstin**
**Ann og Lis**

†

**Jarðarferð**

Kistan við

**Kaj Tausen**
Hov

fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Hovs kirkju leygardagin kl. 13.

*Familjunnar vegna*
**Sólbjørg og Súsanna**

Tey, ið vilja minnast Kaj, kunnu lata Føroysku Sjómanskirkjuni eina peningagávu, konto í peningastovnunum.

†

### Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Kaj Tausen í Hovi** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Hovs kirkju leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Kaj kunnu lata Føroysku Sjómanskirkjuni eina peningagávu. Konta í peningastovnunum.

**Hertha Andreasen** fer til gravar úr Fuglafjarðar kirkju mikudagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Herthu kunnu lata Alzheimersfelagnum eina gávu. Konta í peningastovunum.

**Kurt Hansen, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum páskadag, 72 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum hósdagin 27. mars kl. 18. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju fríggjadagin 28. mars kl. 13. Tey, ið vilja minnast Kurt, kunnu lata Lions Club Tórshavn eina peningagávu til vælgerðandi endamál. Konta í Eik.

**Vilborg Vestergaard**, ættað úr Hvalba, búsitandi í Havn, andaðist páskadag, 63 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin 26. mars kl. 17. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin 27. mars kl. 13. Tey ið vilja minnast Vilborg, kunnu lata Eldrasambýlinum í Hvalba eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

### Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum mintust
meg á 90 ára degnum.
Ein serstøk tøkk til Vestmanna kirkjukór,
sum saman við Hannis sang so vakurt
fyri mær.
Øll tit, sum hjálptu so væl til
í Meinigheitshúsinum.
Hjartaliga takk øll somul.
Harrin signi tykkum øll.

**Bestu heilsanir**
**Fanny Johannesen, Sandavágur**

**Dagurin**
**27. mars. Kastor.** Tær gomlu søgurnar nevna fleiri annars ókend halgimenni, sum itu Kastor og vórðu tikin av døgum 27. og 28.mars.

### Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu,
tá okkara kæra mamma, omma og langomma

**Vanja Seyer Skaalum**
Hvalba

andaðist og fór til gravar.
Tøkk til starvsfólkið á B7 fyri umsorgan og hjálp.
Tøkk til Símun, prest í Hvalba, fyri vælvald
og troystandi orð, til sangarar og allar kirkjutænarar.
Tøkk fyri blómur, heilsanir og gávur til
Hvalbiar Kirkju.
Ein stór tøkk til tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Og ein serstøk tøkk til Oddbjørg, Páll og Ingibjørg
fyri tykkara trúfesti og hjálp.
Hjartans tøkk til øll tykkum, sum fylgdu mammu til
hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Døturnar**